# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg kann ikki taka hædd fyri, hvør er landsliðsspælari og ikki
Rúni Nolsøe, HB-venjari*



*Saman við Jákupi á Borg og Høgna Madsen sat Jógvan Martin Olsen í morgun við fundarborðið í FSF-húsinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Tveir ÍF'arar á landsliðnum

**Áki Petersen og Høgni Madsen er nýggjur á fótbóltslandsliðnum, sum nú eisini telur Jónas Tór Næs. Andrew av Fløtum hevur mist sín landsliðssess**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um trý nýggj nøvn, sum Jógvan Martin Olsen hevði á listanum, tá hann í morgun almannakunngjørdi, hvørjar 18 spælarar hann hevur við sær, tá fótbóltslandsliðið tann 4. juni fer til Estlands, har venjingardystur er á skránni.

Fortreytirnar hjá Jógvan Martini vóur, at Mikkjal Thomassen og Ingi Højsted vóru úti við skaða, meðan Jón Rói Jacobsen er upptikin av lestri, og tí skuldu onkur nýggj nøvn á listan.

Og sambært venjaranum, so var alt annað enn lætt at finna hesi.

- Tað er sjáldan, at eg havi havt so trupult við at seta navn á hópin. Eina mest tí ov nógvir av spælarunum, sum vanliga eru í myndini, ikki hava staðið seg serliga væl. Í so máta vísir tað væl støðuna, at ein spælari sum Øssur er ein av teimum, sum í størstan mun hevur sýnt tær dygdir, sum eg leiti eftir, segði Jógvan Martin Olsen millum annað.

Hartil iðraði hann seg ikki sørt um, at Jón Rói noyddist at geva avboð.

- Eg hevði vónað, at eg nú kundi spæla hann og Fróða Benjaminsen betur saman í verjuni, men tað verður so ikki í hesum dystinum, at eg havi tann møguleikan, kundi hann bara staðfesta.

Av nýggju monnunum var Høgni Madsen helst tann, sum tók størstu yvirskriftirnar. Fuglfirðingurin hevur staðið sterkur í myndini í ár, men hann hevur ongan tíð áður verið nevndur sum seriøsur biðil til eitt pláss á landsliðnum. Har hevur Áki Petersen hinvegin verið havdur á munni onkratíð, eins og Jónas Tór Næs nú í meira enn eitt ár hevur bankað hampuliga hart á dyrnar.

Men samanumtikið ein úttøka, sum í stóran mun eisini er eitt veldugt heraklapp til ÍF og tað avrik, sum teir hava sýnt fyrstu sjey umførini av Formuladeildini.

## FAKTA um landsliðshópin

**Málmenn**
Jákup Mikkelsen, KÍ
René Tórgarð, EB/Streymur

**Verjuspælarar**
Fróði Benjaminsen, HB
Jóhan T. Davidsen, NSÍ
Jónas T. Næs, Køge
Einar Hansen, NSÍ
Herbert í Lon Jacobsen, B36
Áki Petersen, ÍF

**Miðvallarar**
Jákup á Borg, HB
Símun Samuelsen, Keflavík
Høgni Madsen, ÍF
Súni Olsen, Viborg
Tem Hansen, Lyngby
Atli Danielsen, Frem

**Áleyparar**
Rógvi Jacobsen, Hødd
Christian Høgni Jacobsen, HB
Arnbjørn Hansen, EB/Streymur
Christian Lamhauge Holst, Lyngby

## Bilsin og fegin

Høgni Madsen úr ÍF er ikki ein av spælarunum, sum vanliga hevur verið settur í samband við landsliðið.

Sjálvur segði spælarin eisini, at hann ikki visti av nøkrum, fyrr enn landsliðsvenjarin umvegis telefon gav honum boð sunnukvøldið.

- Sjálvandi hevur tað gingið væl hjá okkum, og tí vónar mann kanska. Men eg varð rættiliga bilsin, tá hann ringdi, segði Høgni Madsen á tíðindafundinum.

Og hjá tær persónliga er tað væl ein stór kollvelting at standa í hesi støðuni, um tú sammetir við støðuna, sum tú vart í í Klaksvík fyri einum ári síðani?

- Tað er tað gott nokk heilt alvorliga. Men tað sá ikki út til, at teir kundu brúka meg.

So teir skuldu kanska brúkt teg á miðvøllinum ístaðin fyri á bakkinum?

- Tað er tað, segði ein stórsmílandi Høgni.

**-mørk**

